## Ikki bara í Miðeystri

Sum verandi heimsins største oljugoymsla, so er tað ikki løgið, at nógv av tí, sum Simmons førir fram, snýr seg um Miðeystur og serstakliga Saudi-Arabia. Ikki minst tí tað neyvan nakra aðra staðni í verandi goymslum ber til - soleiðis uttan víðari - at økja framleiðsluna við fleiri milliónum tunnum um dagin.

Men støðan aðra staðni er lítið frægari. Í 1985 megnaði USA einsamalt at framleiða 8,9 mió tunnur av olju um dagin. Í 1990 var talið fallið til 7,3 mió/dagin, og í dag er framleiðslan 5,1 mió tunna um dagin. Hetta hóast oljuframleiðslan í dag verður mett at vera 100% effektiv. Hóast raffandaríini í dag framleiða alt samdøgrið og hóast eingin ídnaðarferia verður hildin.

Samstundis er orkunýtslan vaksin somikið nógv, at heimsins størsta ídnaðarsamfelag, sum eitt langt skifti megnaði at nøkta sín egna oljutørv, í dag noyðist at innflyta einar 11 mió tunnur av olju um dagin.

Hartil skal eisini hugsast um metvøksturin í asiatiska búskapinum. Ein vøkstur, sum uttan nakran sum helst iva fer at hava ein alsamt vaksandi eftirspurning við sær, uttan at hesi lond sjálvi megna at nøkta tann tørvin við egnari framleiðslu.

Og í Norðsjónum er sama støðan. Hóast nýggj leiti- og framleiðslutøkni fyri bara 10 árum síðani gav vónir um, at verandi fundini bara vóru byrjanin, so hevur veruleikin verið ein annar. Tað vísur seg nevnliga, at síðani 1999 er framleiðslan í Norðsjónum minkað við 25%, enn er einki fund gjørt av slíkari støðd, at tað talar fyri einum vøkstri í bræði.

**-mørk**

# Oljan er alt ov bí



*Tað er nógv, sum bendir á, at oljuframleiðslan hjá størsta framleiðaranum í heiminum, Saudi Arabia, langt síðani hevur verið í hæddini. Og enn eru eingi nýggj felt av týdningi funnin*

**Heldur enn at halda talan vera um eina fyribils støðu við høgum oljuprísum, eiga vit at venja okkum við støðuna. Og veruleikin kann væl verða, at dagsins prísir verða bæði fimm- og tíggjufaldaðir**

OLJUPRÍSIR
*Jákup Mørk*

Soleiðis sigur Matthew R. Simmons, og hann er ikki hvør sum helst. Sum nevndarformaður í einum íløgufeløg, sum hevur servitan innan orkuídnaðin, hevur hann eitt ógvuliga stórt innlit í ídnaðin, og hartil hevur hann í fleiri umførum verið partur av ymsum ráðum og nevndum, sum onkursvegna eru tengd at oljuvinnuni.

Hann gav fyrr í ár út bókina, Twilight in the Desert, og her viðger hann serstakliga tey oljufund, sum í dag eru hornasteinurin undir alheims oljuframleiðsluni. Og ikki minst, hvussu hann roknar við, at hesi fara at tømast innan alt ov leingi, uttan at onnur fund av tilsvarandi støðd koma ístaðin. Nakað sum uttan iva fer at trýsta oljuprísirnar langt uppeftir.

### Avmarkað útboð

Fyri góðum mánaði síðani var Simmons partur av eini samrøðu í tíðindasendingini, Financial Sense, og snýr hendan samrøðan seg í stóran mun um oljuprísir. Hvussu hesir verða stýrdir, og - ikki minst - hvussu hesir í veruleikanum eru alt ov lágir.

- Tað er ótrúligt, men allar simulatiónir av alheims orkutørvinum, taka støði í, at Saudi Arabia framleiðir 25 millónir tunnur av olju um dagin í 2025. Og tað er nú slettis ikki so víst, heldur hann.

- Heldur verður tað so, at vit í 2030 hava eina heimsframleiðslu, sum einans megnar at framleiða millum 10 og 20 milliónir tunnur um dagin, og tað er altso 100 milliónir minni, enn búskaparfrøðin roknar við. So talan er veruliga um eina »major, major, major global issue«, sum hann málber seg.

Hóast oljuídnaðurin er ein av týdningarmestu stuðlunum í dagsins ídnaðarsamfelag, og hóast Saudi Arabia er mest týðandi framleiðarin í hesum, so var tað skelkandi fyri Simmons at koma eftir, at enn hevði eingin kortlagt oljugoymslurnar í landinum. Hetta setti hann sær so fyri at gera fyri fáum árum síðani, og sambært egnari útsøgn, so var niðurstøðan skelkandi. Somikið skelkandi, at hann gjørdi av at skriva eina bók.

### Falskar vónir

Ein av teimum trupulleikum, sum Simmons nertir við í bók síni, er, at stóra framleiðslan í Saudi Arabia, og tosið um eina nógv størri framleiðslu í framtíðini, byggir á skeivar fortreytir.

Oljuframleiðslan hjá OPEC-londunum verður partvíst stýrd av, hvussu stórar goymslur - reservar - tað verður roknað við, at undirgrundin goymir. Eitt slag av stýring, soleiðis at virðini ikki verða tikin ov skjótt upp, og at oljufeltini á tann hátt verða tømd ov tíðliga.

> ” *Heldur verður tað so, at vit í 2030 hava eina heimsframleiðslu, sum einans megnar at framleiða millum 10 og 20 milliónir tunnur um dagin, og tað er altso 100 milliónir minni, enn búskaparfrøðin roknar við*

Her hava boðini úr Saudi Arabia verið, at talan er um nærum ótømandi goymslur av olju. Sagt hevur verið, at goymslurnar, sum í dag eru 260 milliardir tunnur, lættliga kunnu økjast til 460 mia, og at tað hartil skulu leggjas aðrar 200 mia tunnur, ið er væntað goymsla á feltum, sum enn ikki eru funnin.

Men veruleikin er tó ein annar. Í dag verður bróðurparturin av oljuni í Saudi Arabia vunnin úr fimm stórum feltum. Og tað seinasta av hesum varð funnið í 1967. So hóast leitingin hevur verið meira intensiv seinastu 40 árini, og hóast útgerðin at leita og bora við hevur verið tann besta, sum